52-018/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-018/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Ingilín Didriksen Strøm, løgtingsmanni, um javnrættindi til samkynd og børn teirra

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu og nær ætlar løgmaður at tryggja børnum at samkyndum javnrætt?

2. Hevur løgmaður framvegis somu meining sum í februar, at allir borgarar og børn skulu hava javnrætt?

Svar:

Til nr. 1: Løgtingið hevði í februar tvey uppskot til viðgerðar, sum bæði snúðu seg um at geva børnunum javnbjóðis rættindi í barsilsskipanini. Tað eina fekk undirtøku frá 16 í andstøðuni, og hitt frá 16 í samgonguni. Sostatt fekst ikki undirtøka fyri hesum tá.

Tað hevur týdning, at øll børn fáa javnbjóðis rættindi. Tað skal ikki vera soleiðis, at børn fáa ymiska viðgerð, alt eftir hvussu foreldrini hava valt at skipa síni viðurskifti.

Familjurættarliga økið er umfatandi og krevur tí eina neyva gjøgnumgongd, har atlit verða tikin at øllum hugsandi viðurskiftum.

Spyrjarin vísir í viðmerkingum sínum á, at uppskot til løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru, sum er sent í hoyring, ikki tryggjar rættindi hjá samkyndum og børnum teirra.

Reglurnar um rættarligan foreldraskap eru ásettar í lov om børns retsstilling – ikki í foreldramyndugleikalógini. Skulu broytingar gerast um, hvør rættarliga skal vera foreldur, er tískil neyðugt at broyta barnalógina.

Samgongan fer at nútímansgera foreldramyndugleikalógina sambært verandi fortreytum, tí hon fyrst og fremst tryggjar rættindi hjá børnunum og samband teirra við foreldrini.

Til nr. 2: Løgmaður hevur somu áskoðan sum í februar, og landsstýrið arbeiðir áhaldandi fyri at skapa góðar karmar fyri allar borgarar í Føroyum.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Tá tað kemur til etisk mál eru nógvar kenslur uppá spæl og trupult er at fáa semju um hesi málini. Hetta er helst orsøkin til, at hesi mál ikki vórðu loyst samstundis sum hjúnabandslógin bleiv broytt í 2017.

Í Tinganesi, 23. august 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður